LM-137/2020

Fylgiskjal 5

Tórshavn, tann 31. mars 2021

Fiskimálaráðið
Yviri við Strond 15
100 Tórshavn

Viðv. hoyringssvari um broytingar í sjófeingislógini

Fiskimálaráðið hevur sent til hoyringar uppskot til broytingar í sjófeingislógini. Eftir uppskotinum skal árliga verða loyvt at landa 15% av veiðuni av øllum fiskasløgum uttanlands.

Uppskotið er sprottið úr uppskotinum til lóg um veiðigjald. Í viðmerkingunum til uppskotið verður víst til tilmælið, sum ein arbeiðsbólkur gjørdi viðvíkjandi eini framtíðar skipan við veiðigjaldi. Har verður m.a. sagt: *"Tað hevði verið ein trygd fyri prísásetingina í Føroyum, um ein partur av veiðuni kann avreiðast uttanlands. Hetta hevur serliga víst seg at vera ein avbjóðing, tá tað við hvørt bert er ein veruligur keypari á marknaðinum".*

Felagið Nótaskip tekur undir við uppskotinum. Trupulleikin, sum arbeiðsbólkurin sipar til, snýr seg um svartkjaft sum verður landaður til ídna í Føroyum. Har er bert ein keypari. Við verandi banni fyri at landa uttanlands, kann hesin keypari áseta prísin uttan nakra kapping frá øðrum.

Tá svartkjaftafiskiskapurin er í hæddini, er ofta drúgv bíðitíð eftir landingartørni hjá hesum virki, og tí hevur landsstýrismaðurin seinastu tvey árini loyvt, at tað hevur verið frítt at landa svartkjaft uttanlands í eitt ávíst tíðarskeið.

Felagið Nótaskip heldur, at tað er ikki heppið, at tílíkar ásetingar verða lýstar ár um ár. Ein varandi skipan hevði givið reiðaríunum betri møguleikar fyri at leggja fiskiskapin til rættis.

Trupulleikin verður ikki loystur, um loyvt verður at landa 15% av veiðuni uttanlands. Lønsemið í svartkjaftafiskiskapinum er tengt at, at veiðiorkan hjá hvørjum einstakum skipi í mest møguligan mun verður brúkt á hvørjum túri.

LM-137/2020

Skipini, sum eru limir í Felagnum Nótaskip, kunnu lasta millum tvey og trý túsund tons av svartkjafti, og ein last upp á t.d. 2.500 tons, krevur eina kvotu upp á 16.700 tons.

Út frá hesum skjóta vit upp, at tað árliga verður loyvt at landa upp til 40% av veiðuni av svartkjafti uttanlands.

Vit halda eisini, at tað er av týdningi, at landsstýrismaðurin varðveitir heimildina til at geva meira viðfevnd undantøk, tá tørvur er á tí.

Vinarliga

Jógvan Jespersen,*stjóri*

NÓTASKIP

Felagið Nótaskip
Faroese Pelagic Organization
Óðinshædd 7
P.O.Box 1038
110 Tórshavn
Faroe Islands
Phone + 298 739910
E-mail: notaskip@notaskip.fo
www.notaskip..fo